# Børn millum skúla og barnagarð

Jústinus Leivsson Eidesgaard
Mynd: Jens Kr. Vang



*Børn í skúlabólki í Hoyvík.*

Tey seks til sjey ára gomlu, sum enn eru í barnagarði, vilja gerast størri eins og onnur børn. Og tá ið tey eru í skúlabólki í barnagarðinum, hevur tað týdning fyri tey, at hesin verður kallaður skúli og ikki nakað annað.

Tey síggja upp til tey størru børnini, sum longu eru farin í skúla og tey vilja líkjast teimum og gera sum tey. Og tey kenna seg eisini meira enn tey minnu børnini í barnagarðinum og tað verður sæð upp til tey av teimum smærru. Tað hevur týdning, at tey hava sína egnu tasku við í skúlabólki. Tey kenna ábyrgd fyri, at alt er í taskuni, sum har eigur at vera, somuleiðis í penalarhúsinum og ikki minst í matpakkanum. Tey eru vorðin stór og nú skulu tey í skúla og tað skal ganga ordiliga fyri seg.

Hetta eru brot burtur úr einum degi, har fólk á dagstovnunum í Hoyvíkar-økinum settu seg niður og deildu royndir um hvussu tað var, at fyrireika børnini seinasta árið í barnagarðinum, til tað sum lá fyri framman. Tað er eitt sindur av einum ongamannalandi børnini ferðast í, seinasta árið áðrenn tey fara í skúla. Í samfelagnum verður ofta spurningurin havdur á lofti hvør eigur hesi børn. Eru tey ov ung at fara í skúla, eru tey ov gomul at ganga í barnagarð? Og meðan sjónarmið um hetta verða havd á lofti og búnast, og vit longu hava fingið nultaflokk onkunstaðni í landinum, eru starvsfólkini í barnagørðunum um børnini og tey fyrireikað tey spakuliga til skiftið sum hendur komandi summar. Tað fyrsta tilvitaða og stóra skiftið av mongum í einum mannalívi.

- Fyri okkara skúlabólk halda vit, at tað hevur størsta týdning, at tey varðveita hugin til at læra og spyrja. Tey skulu undrast og granska, sigur Miriam Johannesen, sum hevur skúlabólk á dagstovninum Sólareygað.

Skiftið millum barnagarð og skúla merkir, at størri krøv verða sett til børnini og tey skulu duga at føra seg fram í einum størri samanhangi. Eitt nú, at ansa eftir og halda skil á sínum tingum, at lurta eftir hinum og at rætta fingurin upp, tá ið tey hava nakað á hjarta. Tey flyta úr tí meira varda í einum barnagarði í ein skúlaflokk, har onnur meira vaksin krøv verða sett til tey.

## Virkin børn

Barnagarðarnir í Hoyvík, Kaldbak og í Kollafirði hoyra saman í einum øki og allir hesir barnagarðar hava skúlabólk við teimum 6-7 ára gomlu.

Bjørg Poulsen á Býlingshúsinum Inni á Gøtu er ein av teimum, sum hevur ábyrgdina av skúlabólkinum tríggjar dagar um vikuna, tá ið tey fara av stovninum og út í samfelagið.

– Mánadag gera vit ofta túrar í náttúruna og børnini læra at eygleiða tað sum hendur í náttúruni ymisku árstíðirnar. Tey klúgva upp á steinar og vit vitja viðarlundirnar. Hetta gevur felagsskap og er gott fyri rørslurnar. Hósdag plaga vit at svimja og nú sleppa tey eisini at royna tann kalda hylin. Aftan á fara við í Norðurlandahúsið at eta matpakka, sigur hon.

Børnini á Flatnagarði í Kaldbak sleppa at luttaka í vanliga arbeiðinum á bygd. Mona á Bøgarði sigur, at børnini eitt nú eru við í fletting. Tvær reisur um vikuna eru tey í skúlabólki á stovninum. Tey gera ofta útferðir til Havnar, har tey vitja ymisk virkir og stovnar.

## Skúli

Fyri børnini á Dagstovninum í Hoyvík hevur tað stóran týdning, at tá tey eru í skúlabólki, tá eru tey í skúla. Tey vilja hava at ein spaki verður kallaður ein spaki.

– Í bólkinum eru tríggir dreingir og sjey gentur og tey vilja hava at vit kalla bólkin fyri ein skúlabólk, og tá ið tey eru í skúlabólki eru tey í skúla. Vit hava eina roknibók fyri nultaflokk og vit hava egna skúlastovu. Tey læra at halda á blýanti. Annars vitja vit í býnum. Eru á Margarinfabrikkini og á arbeiðsplássunum hjá foreldrunum. Hetta hevur stóran týdning fyri børnini. Og ymiskt er hvat tey drøyma um sum vaksin. Dreingir vilja ofta vera politistar, men annars eru ynskini ymiskt. Summi drøyma um at selja slikk í SMS og fyri onnur eru ísarnir hjá Poul Michelsen lokkandi, sigur Marin Jákupsdóttir.

– Tað, sum vit í stuttum gera í skúlabólkinum er, at vit fyrireikað børnini til lívið,sum bíðar eftir teimum uttan fyri barnagarðin, sigur hon.

## Góð við hvørt annað

Seinasta árið ein barnagarður kann ávirka børnini er júst, tá ið tey fara í skúlabólk og stovnarnir í Hoyvíkarøkinum leggja dent á, at gera børnini sjálvstøðug og menna teirra sosialu førleikar.

– Eitt nú leggja vit okkum eftir at fáa børnini at skilja í millum arging og happing. Vit hava eisini eitt massaguprogram, har børnini læra at massera hvørjum øðrum og harvið at vera góð við hvørt annað. Tað er ikki lætt at gera einum øðrum ónáðir, sum ein hevur masserað frammanundan, sigur Elisabeth, sum arbeiðir á stovninum í Maritugøtu.

– Tað hevur stóran týdning fyri børnini í skúlabólkinum, at tey fáa fyri. Tey kenna tað ikki sum at tey hava verið í skúla, um tey ikki fáa lektiur fyri. Vit leggja stóran dent á málsligu førleikarnar og fortelja nógv søgur. Børnini fortelja eisini søgur, og tað hevur týdning at lurtað verður eftir hesum søgum, sigur Maria Sørensen úr dagstovninum í Maritugøtu.

## Seinasta árið

Í Býlingshúsinum Millum Gilja verður stórur dentur lagdur á, at børnini í skúlabólkinum fáa eitt so gott ár sum gjørligt, áðrenn tey koma í skúla.

– Hetta er eitt virkið ár hjá børnunum. Børnini eru nógv úti og uttan fyri barnagarðsøkið. Vit vitja víða um í samfelagnum og árið endar við eini legu. Tey vitja eisini skúlar fyri at fáa eina fatan av hvat bíðar teimum í komandi ári, sigur Elisabeth Rasmussen frá barnagarðinum Millum Gilja.

Elisabeth er ættað úr Sandavági og børnini hava eina eplaveltu í Sandavági, sum tey ansa eftir og taka upp, tá ið tíðin er komin til tað.

## Ganga úti um náttina

Børnini í skúlabólkinum í barnagarðinum Yvir á Flat kenna fleiri fuglar, tá ið tey koma í skúla og tey kenna eisini eggini hjá hesum fuglum. Tey eru nógv úti í náttúruni.

– Eitt tey halda nógv um er ein ferð út í myrkrið um kvøldið við lykt. Foreldrini eru við. Hetta er ein ógvuliga spennandi uppliving. Vit gera nógv burtur úr náttúruni, eitt nú hava børnini gjørt ein hval í fullari støddúr pappi, sigur Poula, sum er ættað úr Nólsoy og tí eru børnini í hennara skúlabólki vælkend í Nólsoy, har tey millum annað seta mammueplir niður og fáa eplabørn upp aftur.

## Læra bindindi

Skúlabólkurin á dagstovninum Undir Brúnni hittist tvær ferðir um vikuna. Børnunum dáma sera væl at fáa uppgávur.

– Vit leggja okkum eftir at læra børnini bindini og serliga at lurta eftir hvørjum øðrum og ikki at flenna eftir, um onkur í bólkinum ikki dugir so væl. Børn hava nógvar tankar í hasum aldrinum, tí hevur tað stóran týdning at læra tey dialog, siga Rannvá og Hildur frá dagstovninum Undir Brúnni.

## Kenna seg stór

Børn í skúlabólkinum kenna seg størri enn tey yngru og tey dáma væl at skipa fyri og standa á odda fyri teimum yngru. Hetta siga Maria og Maibritt, sum báðar starvast á býlingshúsinum á Ternuryggi. Har eru 11 børn í skúlabólki og tey hittast tvær dagar um vikuna.

– Vit vaksnu royna at vera nærverandi saman við børnunum. Meira eitt barn lærir at uppliva og sansa, betri er tað ført fyri at liva, sigur Maria.